## DAGSINS MEINING

# Tjóðskapur í skugga

Mikil orrusta tók seg upp, tá borgarstjórin í Hósvík, Jógvan Mørkøre, nærum fyri opnari mikrofon segði, at hann hevi fingið lovað eina lækna afturat til læknadømið fyri at stuðla Helenu Dam á Neystabø til formansvalið í Sjálvstýrisflokkinum.

Einki er at ivast í, at hann leyp fram av, og hann umbar seg eisini í Útvarpinum dagin eftir fyri at hava orðað seg eitt sindur knortlut. Kanningin hjá løgmanni vísti eisini, at eingin rossahandil var farin fram. Hann var lopin fram av, og hetta viðgekk hann. Tað er ein erlig søk at viðganga eitt mistak.

Hesin tátturin í útvarpssamrøðuni kom at skugga fyri hinum partinum í samrøðuni, nevniliga tað, at borgarstjórin í Hósvík hevur skift flokk, og grundgevingarar fyri floksskiftinum. Jógvan Mørkøre hevur verið limur í Javnaðarflokkinum og hevur tikið lut í orðaskiftum á landsfundum floksins. Hann hevur sínar meiningar og harafturat hevur hann orðið í síni makt.

Harafturat hevur Jógvan Mørkøre her í blaðnum í eini samrøðu sagt, at hann tók ikki undir við politikki Javnaðarfloksins í sjálvstýrismálinum. Tað er eisini ein erlig søk, og tað er ein demokratiskur rættur at kunna bera fram sína áskoðan og sínar serligu meiningar, líka mikið um hon er í samljóð við almenna politikkin hjá flokkinum, ella um hon víkir frá.

Borgarstjórin í Hósvík hevur m. a. ført fram, at politikkur floksins í dag er ikki í tráð við politikkin hjá flokkinum undan seinasta løgtingsvali, tí í dag er politikkurin meiri sambandskendur. Og so er spurningurin, um hann hevur rætt í tí ella ikki. Tað er einki at dylja yvir, at Javnaðarflokkkurin var flokkurin, sum endurnýggjaði orðaskiftið um framtíðarstøðu Føroya.

Flokkurin legði fyri við at samtykkja á landsfundi fyri trimum-fýra árum síðani, at nú máttu Føroyar koma longur fram á sjálvstýrisleið, og boðið hjá flokkinum eru so tankarnir um eina sjálvstýrislóg, sum miðjar eftir, at vit kunnu yvirtaka øll málsøki, tá vit eru før fyri tað, og annars leggja orku í at gera Føroyar sjálvbjargnar búskaparliga og fyrisitingarliga. V. ø. o. ein hóvlig leið ímóti sjálvstýri ella fullveldi.

Í hesum politikki er einki broytt, og sambært teimum flestu veljarakanningunum tekur ein stórur partur av føroysku veljarunum undir eini slíkari millumloysn. Men fullveldismálið hevur kanska sett hesa javnaðarætlan í skuggan, og ein andstøða til fullveldi uttan fyri ríkisfelagsskapin setir Javnaðarflokkin kanska í bás sum ein meira ella minni sambandsflokk. Og tað er ikki rætt.

Men tá hetta er sagt, skal eisini leggjast afturat, at spurningurin er, um Javnaðarflokkurin kanska ikki hevur gjørt ov lítið við at vera við í orðaskiftinum um veruligt sjálvstýri, og víst á, at flokkurin sanniliga eisini er ein tjóðskaparflokkur og hevur tikið undir við øllum tí, sum føroyska tjóðskaparrørlan hevur staðið fyri - politiskt og mentannarliga.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

## Anna Sofía Jacobsen farin



Mikumorgunin andaðist Anna Sofía Jacobsen á Argjum. Hon var 100 ára gomul.

Anna Sofía var fyrsti føroyingurin, sum fylti 100 ár í nýggja túsundáraskeiðnum. Tað var tann 16. mars 2000, og vantaði henni sostatt tveir mánaðar í at verða 101 ár, nú hon sovnaði burtur.

Anna Sofía var ættað av Eiði, men flutti ung til Havnar og gifist Dánjali Jákupi Jacobsen úr Leynum. Tey búsettust í Havn. Tey fingu seks børn. Fimm eru døtrarnar. Einasti sonurin doyði í 1986, bara 56 ára gmal.

Anna Sofia hevur liva stillisliga, og hon legði stillisliga frá sær. Gjørdist sjúk fyri stuttum og sovnaði so stillisliga mikumorgunin.

Tá hon fylti 100 ár fyri knøppum ári síðan, hevði Sosialurin samrøðu við hana undir yvirskriftini: »Eg havi havt tað gott.«

Og soleiðis var hon. Nøgd við alt og øll og hevði bara gott at bera fólki. Ein eginleiki, ið nógv áttu at misunt henni, og fleiri at fingið bornan í kjøtið.

Anna Sofía hevur seinnu árini búð hjá dótrini, Turid, í Bakkagøtu á Argjum. Og tað var eisini heima, hon legði eyguni saman fyri seinastu ferð.

Friður veri við minni hennara.

**ej**

## Minningarorð um Høgna Simonsen

*17. oktober 1937 -*
*13. januar 2001*



Høgni Simonsen var føddur á Skarvanesi, sum næstynsgtur av teimum átta børnunum hjá Andreu og Mortan Simonsen. Tá hann var um sjey ára aldur flutti familjan til Havnar at búgva. Eftir lokna skúlagongd, fór hann til skips, og sigldi við bæði føroyskum og íslendskum skipum.

Hann var m. a. við til at bjarga manningini á íslendska trolaranum, Goðanes, sum rendi á Flesjarnar í síðst í 50'unum.

Høgni bleiv tó ikki sjómaður. Í 50'unum og 60'unum koyrdi hann í fleiri skiftum hýruvogn í Havn, arbeiddi á Tunnuvirkinum og hjá Restorff Bryggjarí, har hann var í fleiri ár. Síðan miðskeiðis í 70'unum hevur Høgni havt egnan hýruvogn og koyrt á bilstøðini Auto, til hann nú mátti leggja frá sær vegna herviliga sjúku.

Seinnu árini hevur hann verið stjóri á P/F Auto, og er støðin fyrimyndarliga væl rikin undir hansara leiðslu. Eisini hevði hann stórar ætlanir um útbygging av støðini og um at fáa eitt minnisrit skrivað, til støðin um tvey ár verður 50 ár. Hann gloymdi ikki Skarvanes, og fyri nøkrum árum síðan bygdi hann sær eini hús har at koma til í frítíðini.

Høgni giftist við Margrethu Toftenæs úr Leirvík, og fingu tey børnini Atla og Duritu.

Við sama áliti, sum Høgni hevði á Jesusi, frelsara sínum, lýsa vit Guds frið yvir minni um Høgna Simonsen og sýna djúpastu samkenslu við tykkum sum sita eftir.

**Magnus**

---

**Tøkk**

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Hákun Jacobsen**
**Nólsoy**

doyði og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

**Ásla**

**Tummas Jákup, Oda, Trygvi, Jógvan og Sigrun**
**Maria, Sonni, Sylvia, Óluva, Birita, Hákun**
**og Sólbjørn**

---

†

Kunngjørt verður ætt og vinum at elskaða kona, mamma, omma, langomma, systir og vermóðir

**ELLY DJURHUUS,**
**fødd Dam**

úr Havn, andaðist týsdagin 16. januar 82 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.00.

Fyri tey avvarðandi
**Petur**

Tey, ið ætla at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata Zarepta eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

---


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Vit hava ikki álit á landsumsitingina

**– Vit kenna okkum ógvuliga ótrygg við embætisførsluna í Vinnumálastýrinum, tá týdningarmikil skjøl verða útihýst eini viðgerð, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ið hevur sent løgmanni kæru um embætisførsluna**

KÆRA
*Turið Kjølbro*

Tað er serliga mannagongdin í tveimum málum, sum hevur fingið Starvsmannafelagið at skriva til løgmann. Eina er málið um at gera Føroya Lívstrygging til partafelag, hitt er lógaruppskotið um barsilsskipan, sum kemur til fyrstu viðgerð í dag. Í báðum førum sigur Starvsmannafelagið, at skjøl, sum hava avgerandi týdning fyri løgtingsins viðgerð, ikki eru latin løgtinginum.

– Vit ivast onga løtu í, at um notatið, sum var gjørt í sambandi við ætlanirnar at gera Føroya Lívstryging til partafelag, varð latið løgtinginum saman við lógaruppskotinum, hevði hetta ávirkað viðgerðina og avgerðina hjá løgtinginum. Vit fílast á embætisførsluna í Vinnumálastýrinum, tá týdningarmikil skjøl verða útihýst eini viðgerð, og spyrja um mál, sum verða løgd fyri tingið verða nóg væl upplýst. Tað er torført at trúgva, at málsviðgerðin í sambandi við orðing av lógaruppskotum kann vera so tilvildarlig, at hetta hendir. Vit hava einki prógv fyri, at hetta er gjørt við vilja, men eingin ivi er um, at hesi dømi ikki kunnu annað enn vekja illgruna. Undanførslan er ferð aftaná ferð, at eitt mistak er hent, men tað góðtaka vit ikki. Tá so nógv mistøk henda, er okkurt rívandi galið. Hetta er átaluvert og eigur at fáa avleiðingar, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

### Stjala burturav

Í málinum um Føroya Lívstrygging viðurkennir Starvsmannafelagið, at tey vóru ov sein á sjóvarfallinum. Tey fingu ikki innlit í skjølini fyrr enn lógin var samtykt at gera stovnin til partafelag. Viðvíkjandi uppskotinum til barsilsgrunn hevur Starvsmannafelagið heitt á landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum um at fáa spurningin um tey 0,8 prosentini avgreidd, áðrenn lógaruppskotið kemur til viðgerðar.

– Vit seta nú okkara vón til, at løgtingsfólk skilja álvaran í hesum, soleiðis at tey 0,8 prosentini, sum eru partur av lønarhækking til okkara limir, ikki verða stolin frá okkum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Greitt er, at Starvsmannafelagið ikki tekur undir lógaruppskotinum til nýggja barsilsskipan soleiðis sum tað sær út í løtuni, men formaðurin í Starvsmannafelagnum vísur aftur, at áheitanin til løgmann er ein máti at spenna bein fyri ætlanini.

– Vit hava einki ímóti, at ein barsilsgrunnur verður gjørdur fyri allan arbeiðsmarknaðin. Hinvegin halda vit, at tað er ein uppgáva fyri arbeiðsgevararnar. Kæran um embætisførsluna hjá Vinnumálastýrinum hevur einki við tað at gera, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Áheitanin frá Starvsmannafelagnum varð handað løgmanni mikudagin. Hann verður biðin um at gera neyðugar kanningar fyri at fáa staðfest, um onnur dømi eru, har landsstýrismenn hava hildið aftur týdningarmikið skjøl í sambandi við, at lógaruppskot eru latin tinginum. Somuleiðis verður løgmaður biðin um at taka neyðugu stigini at forða fyri, at slíkt endurtekur seg.



*– Vit hava einki prógv fyri, at Vinnumálastýrið heldur týdningarmikil skjøl aftur við vilja, men eingin ivi er um, at hesi dømi ikki kunnu annað enn vekja illgruna, sigur Gunnleivur Dalsgarð.*

# Tey vilja grugga málið

**– Tað er púra burturvið, tá sagt verður, at vit halda upplýsingum aftur. Heldur hinvegin yvirupplýsa vit. Ørindini hjá Starvsmannafelagnum við kæruni er at grugga eitt mál, tey ikki taka undir við, sigur Bjarni Djurholm**

KÆRA
*Turið Kjølbro*



*– Eg havi verið tingmaður í nógv ár, og mær vitandi hevur tað ongantíð verið nakar trupulleiki at fáa hendur á viðkomandi upplýsingum, sigur Bjarni Djurholm.*

Starvsmannafelagið kann kenna seg heilt trygt við embætisførsluna í Vinnumálastýrinum, vissar Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, felagið um. At skjølini frá Starvsmannafelagnum ikki vórðu borin í tingið samstundis sum lógaruppskotið um nýggja barsilsskipan varð løgd fyri tingið, var eitt mistak, sum varð rættað so skjótt fólk í Vinnumálastýrinum gjørdust varug við tað.

– Eg vil til eina og hvørja tíð standa inni fyri tí arbeiði, sum verður gjørt í Vinnumálastýrinum. Alt verður gjørt í samsvari við tær lógir og mannagongdir, eg skal arbeiða eftir. Tað stendur ongastaðni ásett, at skjøl, sum hesi frá Starvsmannafelagnum, skulu liggja við einum lógaruppskoti. At vit kortini gera tað er fyri at lýsa málið so væl sum til ber. Tá vit millum jólanna vórðu varug við hetta mistakið, vendu vit okkum til løgtingsskrivstovuna og spurdu, hvussu vit tekniskt kundu leggja skjølini frá Starvsmannafelagnum afturat einum uppskoti, sum varð lagt fyri tingið. Sama dag gjørdi Starvsmannafelagið vart við mistakið og at tey vildu hava innlit í skjølini. Longu dagin eftir fingu tey øll skjøl, samstundis sum løgtingsskrivstovan syrgdi fyri, at øll tingfólk fingu skjølini sendandi. Øllum hesum havi eg eisini greitt Starvsmannafelagnum frá, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, í viðmerking til kæruna frá Starvsmannafelagnum til løgmann..

### Málið kannast

Í heyst varð lógaruppskotið um barsilsskipan sent út til 18 ymsar partar til hoyringar. Tá svarini komu inn aftur í Vinnumálastýrið, avráddi landsstýrismaðurin við fulltrúan, sum arbeiddi við málinum, um at leggja øll skjølini við, tá ið uppskotið skuldi fyri tingið. Samstundis vildi landsstýrismaðurin hava ein samandrátt av viðmerkingunum frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum umframt Javnsstøðunevndini. Hetta skuldi eisini liggja við uppskotinum.

– Av eini ella aðrari orsøk, møguliga tí, at tingið fór heim ein dag áðrenn væntað, lógu nøkur skjøl eftir.

Landsstýrismaðurin vísir aftur, at tey halda aftur skjøl ella upplýsingar. Hann er sannførdur um, at ørindini hjá Starvsmannafelagnum við brævinum til løgmann er at grugga eitt mál, tey ikki taka undir við.

– Tað er púra burturvið, tá sagt verður, at vit halda upplýsingum aftur. Heldur hinvegin yvirupplýsa vit. Eg havi verið tingmaður í nógv ár og mær vitandi hevur tað ongantíð verið nakar trupulleiki at fáa hendur á viðkomandi upplýsingum

Bjarni Djurholm vil ikki gera viðmerkingar til málið um Føroya Lívstrygging, sum er partur av kæruni hjá Starvsmannafelagnum, tí hann var ikki landsstýrismaður tá. Løgmaður skal nú kanna málið.

– Tað haldi eg er í fínasta lagi, sigur Bjarni Djurholm.

# Kvinnur kjakast um barsilsgrunn

**Barsilsgrunnurin verður evnið á fundi hjá Kvinnufelagnum í Havn mánakvøldið**

KVINNUR
*Turið Kjølbro*

Mánakvøldið skipar Kvinnufelagið í Havn fyri fundi í Mettustovu, har lógaruppskotið um barsilsgrunn fyri allan arbeiðsmarknaðin verður til viðgerðar.

Kvinnurørslan hevur síðani miðskeiðis í áttatiárunum arbeitt við hesum fyri kvinnur og menn so týdningarmikla máli, og nú grunnurin er komin so langt sum á tingborð, ræður um at fáa hann gjørdan til veruleika. Ein barsilsgrunnur fyri øll og sum tískil eisini umfatar smáar privatar fyritøkur kann tryggja kvinnum á barnsburðaraldri arbeiði á jøvnum føti við menn við tað, at tær ikki longur nýtast at vera innbygdir fíggjarligir kleppar hjá fyritøkum. Skipanin tryggjar eisini monnum rættin at vera um síni børn - fyri kvinnuna og kvinnurørsluna mál av størsta týdningi.

Á fundinum mánakvøldið, sum verður kl. 20, fara kvinnur at leggja upp til kjak um lógaruppskotið. Tær vera Hanna Joensen, fyrrverandi forkvinna í Javnstøðunevndini, Turið Debes Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini, Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna og fyrrverandi forkvinna í Útnorðurráðnum, og Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna og framsøgukvinna í hesum máli.

Fyrsta viðgerð av lógaruppskotinum um nýggja barsilsskipan skuldi vera mikudagin. Málið varð tikið av skránni og kemur fyri aftur í dag.